# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*Teir spæla góðan tekniskan fótbólt, og eru í so máta ikki nakað typiskt íslendskt lið*
*Albert Ellefsen, HB-venjari*



## Sinkewitz var dopaður

**Týski Patrik Sinkewitz er testaður positivur fyri doping**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sambært týska dpa var royndin, sum Sinkewitz læt tann 8. Juni positiv. Testosteron-innihaldið í royndini var væl hægri enn tað loyvda, tá royndin varð tikin. Súkklarin, sum er á liðnum hjá T-mobile, er tó ikki longur við í Tour de France. Hann mátti nevnliga gevast herfyri, tá hann var við í einum dramatiskum falli og endaði millum áskoðararnar.

Sinkewitz hevur seinnu árini verið mettir sum ein av evnaríkastu súkklarunum í Týsklandi. Hann hevur nú fimm dagar umhugsanartíð, har hann skal gera av, hvørt hann vil taka eina nýggja B-roynd.

## Róðrargalla'ið nærkast

Tá ólavsøkuróðurin er liðugur, er punktum samstundis sett fyri aktiva partinum av kappróðrarárinum. Seinnu árini hevur verið siður at hava róðrargalla, og verður hetta eisini hildið í ár.

Tað er Róðrarfelagið Knørrur, sum skipar fyri veitsluni, sum verður hildin í Høllini á Hálsi í Havn tann 10. august. Tilmelding til veitsluna skal tó vera gjørd í seinasta lagi tann 25. juli. Tilmelding fram á heimasíðuni hjá Knørri, www.rk.fo.

# Føroysku útlendingarnir vunnu vinardystin

**Á vestanstevnu leygardagin varð leiktur ein serligur vinardystur. Útlendsku fótbóltsleikararnir í Føroyum vóru savnaðir á einum liði, og leiktu teir ímóti einum Vágaliði**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Dysturin varð fyriskipaður og leiktur við tí fyri eyga, at varpa meira ljós á trupulleikan við rasismu í føroyskum fótbólti.

Rasisma í føroyskum fótbólti hevur víst seg at vera ein afturvendandi trupulleiki, og Alexandre Braga úr FS Vágum, bar so í bandi, at savna so nógvar útlendingar til dystin sum tilber. Og tað má sigast at hava hilnast sera væl hjá brasiliumanninum, sum fekk savnað so at siga allar útlendsku leikararnir.

Sjálvur dysturin eydnaðist eisini sera væl, og varð hann leiktur við góðum ítróttaranda frammanfyri teimum 200-300 áskoðarunum, sum høvdu sýnt tiltakinum áhuga bara við at møta upp, og hyggja at tí í løtum vakra fótbóltsspælinum.



*Føroysku útlendingarnir vunnu dystin í Sørvági, sum var væl vitjaður av vestanstevnufólkunum*

**Vágaliðið – Útlendingaliðið 3-1 (1-1)**
1-0, Jack Joensen
1-1, Alex Castilho
1-2, Anderson Castilho
1-3, Clayton Soares

**Vágaliðið:**
Trygvi Askham, Hans Arni Ellefsen, Gunnar Haraldsen, FSV-04, Jack Joensen, Ingi V. Joensen, SÍ, Tór-Ingar Akselsen, HB, Jens Erik Rasmussen, Ebbe Kristinn, Kim Poulsen Jørgin Meitilberg, SÍ, Johan Hendrik, MB
Innskiftir: Esmar Fagraberg, MB, Dann Johannesen, B36, Hans Fróði, SÍ, Ingi-Ole Jacobsen, SÍ

**Útlendingaliðið:**
Marcin Dawid, HB, Flávio, Fábio, B71, Robson, GÍ, Alex Dos Santos, Amed Davy Sylla, B36, Gunnar G. Nielsen, Erik G. Nielsen, KÍ, Jovan Panic, FSV-04, Alex Castilho, B68, Krzyzstof Popczynski, TB
Innskiftir: Silva, Heron Charles, FSV-04, Wellington, B71, Heron Charles, FSV-04, Anderson Castilho, NSÍ, Clayton Soares, B71

# Atypiskir íslendingar

**HB skal í kvøld spæla Champions League undankappingardyst móti FH. Eitt lið, sum HB-venjarin als ikki metir sum typiskt íslendskt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan er um spæl um milliónir, tá HB í kvøld skal royna seg í fyrsta umfari í Champions League undankappingini. Higar til er B36 einasta føroyska liðið, sum hevur spælt seg víðari í kappingini, og málið hjá HB er sjálvandi at gera grannunum hetta eftir.

Men talan er tó um truplari uppgávu enn hana, sum B36 í fjør hevði á Malta. FH hevur seinnu árini verið mest sum einaráðandi í íslendskum fótbólti, og nýggi HB-venjarin, Albert Ellefsen, ivast onga løtu í, at talan er um sera sterka mótstøðu.

Teir spæla góðan tekniskan fótbólt, og eru í so máta ikki nakað typiskt íslendskt lið. Ikki minst hava teir eitt gott álop, so tað er lítil ivi um, at vit koma undir stórt trýst í dystinum, sigur hann.

Uppskriftin hjá HB verður tí ikki óvæntað tann eyðkenda hjá føroyskum liðum. Nevnliga at standa væl í verjupartinum fyri síðani at dúva upp á kontra-álop. Men teir ætla sær tó ikki at grava seg niður kortini, sigur Albert.

Nei. Vit fara at spæla við tveimum áleyparanum, sum skulu stuðlast av einum framrættaðum miðvallara. So hava vit trígjar verjukendar miðvallarar, meðan bakkarnir vónandi fáa rúm at koma nakað niðanvið, sigur hann.

Rógvi Jacobsen verður ikki við hjá HB í dag. Hann hevur framvegis leikbann eftir reytt kort, sum hann áður hevur fingið í europiskum høpi. Tí er lítið at ivas tí, at Andrew av Fløtum verður annar maðurin í HB-álopinum.

Dysturin byrjar klokkan 21 føroyska tíð, og hann verður sýndur á íslendsku rásini, Sýnin.